# Nýggj heimasíða um kunningartøkni

KUNNINGARTØKNI

Telduvitan.com er ein nýggj heimasíða, sum í høvuðsheitinum snýr seg um teldur og alt, sum hevur við teldur at gera tvs. teldubygnað, telduútgerð, tað, tú kanst nýta telduna til so sum internetið, tónleik/ mp3, grafikk, myndaviðgerð, heimasíðusmíð, spøl o.m.a.

Síðan er mest ætlað teim ungu úr 10 til 63 ár, og hevur hon eisini hópin av áhugaverdum tilfari til bæði smá, miðalstór og vaksin ung, m.a. lærutekstir um hvussu ein telda er uppbygd, hvussu tú fær telduna at koyra betri og skjótari. Men hetta er bert ein lítil partur av øllum. Eisini hevur Telduvitan fleiri greinir um Virus og hvussu tú sleppur av við ella verjir teg móti Virus, Spyware, Phishing v.m.

Heimasíðan eisini ein tíðindapart við stuttum tíðindasamandráttum hetta á fyrstu síðu við øllum tí nýggjasta innan telduheimin, sum umfatar menning, nýggj útgerð, tað nýggjasta innan internetið tvs. um brósarar/ forrit v.m.

Teir hava eisini valt at geva fartelefoni innivist og hvat nýtt er at fáa og somuleiðis hvørji tilboð eru í føroysku handlunum. Eitt, sum fyllir - ella er ætlað at fylla nógv er ein blokkur um føroyskar KT-handlar, har heimasíðan m.a. sigur vitjandi frá hvørjir handlar selja hvat, hvørji tilboð teir hava "hesa vikuna" og "henda mánaðin". Somuleiðis viðmæla og ummælir Telduvitan.com handlarnar m.a. um hvussu servicestøðið er, hvussu útboðið er og hvussu skjótir teir eru við tí nýggjasta - og sjálvandi, prísmunir handlanna millum og prísmunir millum FO, DK, NO, IS og SE.

Handlarnir fáa eisini í boðið at hava hvør sína síðu, har teir kunnu lýsa við tilboðum, nýggjum vørum ella hvat teimum lystir. Ætlanin er at skapa eina betri kapping og samstundis halda handlunum til soleiðis, at servicestøðið er í hædd við tað, vantast kann í dagsins altjóðagerð.

Eisini velur Telduvitan hvønn mánaða tann besta handilin tann mánaðin og eina ferð um árið velja teir so "Ársins KT-handil".

Internetið fær nógv rúm m.a. við skeiðtilfari um hvussu tú smíðar eina heimasíðu, hvussu tú ger grafikk, bæði vanligar myndir/ tekningar og livandi grafikk (animeraðan). Telduvitan bjóðar eisini fólki at keypa liðugt gjørdar templates, tvs. heimasíðuskabelónir bæði við og uttan flash, hetta fyri ein kostnað, sum eingin annar kann kappast við, heldur ikki USA td. Góðskan á hesum templates er sera høg.

Síðan inniheldur eisini eitt stórt tal av slóðum til spøl, forrit, portalar, antivirustól, bæði online og at taka niður, mp3 fílur í stórum tali. Vit tora at siga, uttan at taka munnin ov fullan, at tað í dag ikki finst nøkur føroysk heimasíða, sum hevur so nógvar góðar og álítandi slóðir.

Sjálvir siga teir á Telduvitan, at hetta er Føroya størsta, besta og mest upplýsandi síða um teldur og alt tað, ið hoyrir telduheiminum til. Tíðindini eru fesk, vegleiðingarnar og lærandi tekstirnir eru skrivaðir soleiðis, at øll skilja teir og tænasturnar eru nógvar og góðar.

Teir leggja stóran dent á teldu/internet trygd, at føroyingurin lætt og skjótt kann nema sær vitan um teldur, forrit o.m.a.

01.10.2005 fór Telduvitan.com alment í luftina og sama dag varð síðan presenterað á stórskíggja í ítróttarhøllini á Hálsi. hetta í samband við Ungdómsráðstevnuna og tað ungdómsarbeiði, sum fer fram á Margarinfabrikkini í Havn.

Telduvitan.com sponsorerar eisini arbeiðið á Margarinfabrikkini og tað kanska mest áhugaverda í hesum høpi er, at hvørja ferð ein fyritøka/ handil keypir eina lýsing á síðuni, fer 10% av lýsingarkostnaðinum til arbeiðið á Margarinfabrikkini. Afturfyri eggjar Telduvitan teim ungu til at útfylla eina síðu (online) um hvussu teimum dámar tey nýggju teldu-spølini, um grafikkin, um møguleikar o.sfr. altso, at ummæla spølini. Henda tænasta er ikki heilt liðug enn, men verður vantandi klár í komandi viku.

Onnur eru sjálvandi vælkomin at nýta síðuna til at luttaka í ummælinum.

Seinni er ætlanin at sponsorera onnur ungdómstiltøk runt um í landinum.

Telduvitan hevur gjørt kanningar um hvussu stórt vitjunartal, teir kunnu

Framhald á síðu 30

## HEILSANIR



**Góði maður**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 12. okt.
**Ynskir kona tín**



**Góði Rani**
Tillukku á 2 ára degnum. Gleði meg at fáa kaku. Eisini heilsan frá ommu og abba.
**Rógvi**



**Góði maður**
Hjartaliga tillukku á 60 ára degnum tann 13. okt. Takk fyri alt tú ert fyri meg. Eg elski teg. Nógv góð ár í framtíðini.
**Heilsan kona tín**



**Góði John**
Hjartaliga tillukku við degnum og góð ynskir í framtíðini.
**Vinarlig heilsan vit í Havn**



**Góði pápi, verpápi og abbi**
Hjartaliga tillukku á 60 ára degnum tann 13. okt. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vit elska teg.
**Heilsan børn, verdóttir og abbadóttir úr Danmark**



**Góði Palle**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum sum var 4. okt.
**Ynskja mamma og babba**



Kenna tit hesa damuna?? Tillukku

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: ____________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Bygd/býur: ____________ Tlf.: ________

Sendið lepan, vmynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo